# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 10. apríl 2014, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Durita á Heygum, Malan Stórá, Herit Magnussen, John Zachariassen og Jógvan Emil Nielsen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hevur Hilbert Elisson boðað frá, at honum berst frá møta á fundinum, og at tiltakslimur fær fundarboð í hennara stað.

Tiltakslimurin Øssur Christiansen fekk fundarboð tann 7. apríl 2014. Hann fekk ikki møtt, og tí fekk næsti tiltakslimum Jógvan Emil Nielsen fundarboð. Hann játtaði at møta á fundinum.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Jógvan Emil Nielsen sum tiltakslimur.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 73**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Tummas í Niðristovu um broyting av byggisamtyktini fyri økið undir og við sethús hansara á matr. nr. 205a, Leitisvegur 19, frá landbúnaðarøki til sethúsaøki.

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi tann 8. apríl 2014 umsókn frá Tummas í Niðristovu um broyting av byggisamtyktini fyri økið undir og við sethús hansara á matr. nr. 205a, Leitisvegur 19, frá landbúnaðarøki til sethúsaøki.

Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 73**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 74**
Tilmæli frá fíggjarnevndini um uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2014.
J.nr. 00.30.10-S02-1-13

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 10. apríl 2014 uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2014.

Uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2014 varð lagt fyri bygdarráðið til 1. viðgerð á fundi tann 26. mars 2014.

Nevndin samtykti at leggja uppskotið óbroytt fyri bygdarráðið til 2. viðgerð.

Fíggjarnevndin mælir til at samtykkja uppskotið til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2014.

**Viðv. 74**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.30

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Jógvan Emil Nielsen

Malan Stórá Durita á Heygum Herit Magnussen John Zachariassen